Filmir á Listastevnuni:

# Stórbýar melankoli

**– Lost in Translation – nakna modernaða menniskjað.**
**»Even the President of the United States sometimes must have to stand naked«**

*Bob Dylan*



*Kim Simonsen*

Í hesum døgum koma filmar sum »Tid til forandring« eftir Lotte Svendsen og »Brødre« eftir Susanne Bier fram. Hetta eru filmir, ið hava ein álvarsaman tóna, ið viðgerð modernaða menniskjað. Tað er torført at raka tónan og sarta lyndið hjá modernaða stórbýarmenniskjanum, tað er tó júst tað, ið eyðnast hjá Sophia Coppola í filminum »Lost in translation«. Hetta er ein lítilátin filmur, ið stillisliga sigur frá eini heilt serligari søgu.

Kenslur eru søgur, vit siga um okkum sjálvi. Málið inniheldur søgur í sjálvum sær, og orðini eru við til at skapa veruleikan. Tosa vit um melankoli ella nostalgi, so skapa vit eisini mangan hesa kensluna. Serliga innan bókmentir og filmin kunnu vit møta modernaðum kenslum. Um vit siga, at heimspekin sigur okkurt alment um heimin, so vil sálarfrøðin siga okkurt alment um einstaklingin, meðan list sigur okkum, hvussu tað er at vera menniskja innani frá.

Ein óvanligur amerikanskur filmur

Í sjeytiárunum høvdu leikstjórarnir valdið í Hollywood. Tá royndu ungir leikstjórar sum t. d. Dennis Hopper, Arthur Penn, Martin Scorsese, John Cassavetes, Francis Ford Coppola, Alan J. Pakula at skapa modernaða filmir um nútíðina og at tulka støðuna hjá modernaða menniskjanum. Filmir sum »Easy Rider«, »The Graduate«, »Aflytningen«, »Taxi Driver«, eru allir klassikarar, ið royndu at finna horvnu amerikansku sálina. Robert Altmann gjørdi filmin »Nashville« og Coppola »Godfather«. Eftir hetta komu nærum allir leikstjórarnir at oyðileggja mangan góðan film, tí teir tóku ov nógv drøgg, serliga kokain. Hetta gjørdi, at menn sum George Lucas og Steven Spielberg sluppu at gera alskins b-filmir um vandamiklar hávar, UFO og stjørnukríggj. Eftir hetta hava leikstjórarnir í Hollywood liva við óhugnaligum krøvum, um at teirra filmar skulu vera »blockbusters«, t.v.s. selja milliónir av atgongumerkjum. Tað sum er horvið í øllum hesum er listarligi sjálvræðisrætturin hjá leikstjórunum. Teir bestu filmarnir, ið koma frá USA er tí mangan framleiddir uttan fyri stóru filmfabrikkirnar. Eitt dømi er Woody Allen, ið ger sínar egnu filmir.

Ein stórur partur av teimum, ið hava áhuga í filmi, tíma ikki at hyggja eftir Spiderman 2, Lord of The Rings, Hellboy, (postmodernaða) Kill Bill ella Tom Cruse (lívið er ov stutt til Cruse). Milliónir av intellektuellum og skapandi menniskjum í USA og Europa leita eftir meiri intellektuellum filmum. Tað er her, at dóttir kenda leikstjóran Francis Ford Coppola, ið gav okkum filmir sum »Dommedag nu« og »Full Metal Jacket«, Sophia Coppola rakar beint við filminum »Lost in Translation«. Coppola minnir um yngri indipendent talent sum Joel og Ethan Coen (Millers Crossing, Barton Fink, Fargo, The Big Lebowsky, O Brother, Where art Thou, The Man Who Wasn´t There) og Charlie Kaufmann (saman við Spike Jonze, Michel Condry) (Being John Malkovich, Orkide tyven og Evigt solskin i et pletfrit sind). Hesi gera meiri krevjandi og intellektuellar filmir.

**Modernaða menniskjað**
**»When you think that you lost everything/ You find out you can lose a little more/ I'm just going down the road feeling bad«.**

*Bob Dylan*

Fyrr var nostalgi eitt slag av hugtyngslu, ið varð hildið at vera ein deyðilig sjúka. Nú er hesin longsul bert ein beisksøtur longsul eftir onkrum, ið einaferð var. Okkurt er farið, skilnaðurin er hendur og missurin er veruleiki. Í filminum »Lost in Translation«, møtast tveir útisetar á ferð í Japan, bæði hava mist okkurt. Bob Harris (Bill Murray) er ein avdankaður sjónleikari. Hann er í Japan fyri at gera eina lýsing fyri eitt japanskt whisky, men hann líður av svøvnloysi og skilir ikki japanar ella sítt egna lív. Hon, Charlotte (Scarlett Johansson) er í Japan og býr á sama hotellinum sum Bob. Hon er gift við einum sjálvglaðum kendum fotografi. Bæði Bob og Charlotte kenna seg vilst í lívinum og ikki minst í Tokyo. Filmurin snýr seg um fólk, ið hava alt, men tó líða av ævigum jetlag yvir okkara tíð.

Danski leikstjórin Lotte Svendsen, tók her fyri til, at modernaða menniskjað dyrkar seg sjálvt og er púra sjúkliga sjálvfokuserað. Humanisman og áhugin í øðrum er avloyst av íbúðarinnrættan. Ongantíð í søguni hevur sjónvarpið víst fleiri sendingar um fólk sum innrætta íbúðir, keypa hús, mála hús og umvæla hús. Tað er helst ótrygga støðan í heiminum í dag, ið eisini hevur fingið fólk at forskansa seg í teirra lítlu (parselhúsa)verð. Lotte Svendsen heldur, at serliga kvinnurnar dyrka hesa veruleikaflýggjan: »Tað kann gott vera, at kvinnurnar ikki eru umboðaðar í Fólkatinginum, men eg haldi, at kvinnurnar hava eitt ósjónligt vald, ið er óendaliga skaðiligt fyri fría tankan. Og eg síggi hetta allarstaðir.«

Eitt annað slag av eskapismu, ið monnum dáma væl eru allar Marvel og superhetju filmir sum »X-men 3«, »Blade 3 og 4«, »Hulk 2«, »Spiderman 2« og »The Punisher«. Skjótt koma bæði Catwoman, Batman og Superman aftur. Tað er sum tíðin ikki er til filmir sum »Lost in Translation« longur, tí í filminum er nærum einki plott, har hendir ikki tað stóra, men filmurin gevir eina góða lýsing av einseminum í stórbýunum og av, hvussu tað er at vera menniskja í dag. Allir filmar, ið royna tað eru áhugaverdir. Sløkkið idiotkassan við bila-, íbúða-, inrættingar- og slankisendingum og vitjið Havnar Bio á Listastevnuni. Hetta er ein hin besti filmurin á skránni í ár.

6.–9. august.
Lost In Translation
USA, 2003. 102 minuttir.
Sophie Coppola.
Við: Bill Murray og Scarlett Johansson.




Føroya Sparikassi hevur 16 privatkundadeildir og 2 vinnulívsdeildir kring landið. Í Føroya Sparikassa starvast 167 fólk. Á deildunum veita vit ráðgeving og selja fíggjarligar tænastur, har aðalvirðini eru tryggleiki og brúkaravinsemi. Hetta er í tráð við visión Sparikassans, sum er at vera brúkaravinarligasti peningastovnur í Føroyum. Á grannskoðanardeildini, Yviri við Strond 2, starvast 3 fólk.

## GRANNSKOÐANARLEIÐARI

Høvuðsuppgávan hjá innanhýsis grannskoðanini er at grannskoða ársroknskapin hjá Føroya Sparikassa, dótturfeløgum og Sparikassagrunninum. Grannskoðanin verður framd samsvarandi góðum grannskoðanarsiði og við atliti til galdandi lóggávu, reglur og viðtøkur.

Grannskoðanin fer fram í samstarvi við uttanhýsis grannskoðanina. Arbeiðið fevnir eisini um ráðgeving, eitt nú innan grannskoðan, roknskap og skatt.

Føroya Sparikassi vil skapa eitt arbeiðsumhvørvi, har bæði starvsfólk og kundar trívast og mennast.

Talan er um sjálvstøðugt arbeiði, har samstarvsevni, nærlagni, effektivitetur og slagkraft eru tíðandi eginleikar. Dentur verður lagdur á, at innanhýsis grannskoðanin er virðisøkjandi í sínum arbeiði.

Umsøkjarar skulu hava eina ástøðiliga útbúgving, ið krevst fyri at gerast statsautoriseraður ella skrásettur grannskoðari. Eisini skulu umsøkjarar hava luttikið í praktiskum grannskoðanararbeiði í minsta lagi í 3 ár seinastu 5 árini.

Grannskoðanarleiðarin verður settur av nevndini í Føroya Sparikassa P/F.

Lønin verður ásett eftir avtalu.

Fleiri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til:

Bjarna Poulsen, grannskoðanarleiðara
e-mail: bjarni.poulsen@sparikassin.fo
tlf.: 348560

Umsóknarfreistin er 16. august. Umsókn við C.V. og avriti av prógvum skal sendast til:

Føroya Sparikassi P/F
Att.: Frithleif Olsen, nevndarformaður
Postsmoga 1309
110 Tórshavn

FØROYA SPARIKASSI
www.sparikassin.fo

REPROZ





MTHøjgaard

# Nýggjar íbúðir
## á Boðaneshamri í Havn





Á Boðaneshamri, Yviri við Strond, verða ætlandi bygdar 32 eigaraíbúðir. Íbúðirnar koma at liggja uppi á hamrinum og fara allar at hava framúrskarandi útsýni.

Talan er um 4 sløg av íbúðum, ið verða 68 fermetrar umframt at tær hava stóra terassu. MTHøjgaard er byggiharri og góðskan verður allan vegin sett í hásætið.

Um tú vilt vita meira, so ert tú vælkomin at seta teg í samband við Inni.




inni – trygt og ómakaleyst til hús

P/f Inni · Meklarafelag · N. Finsensgøta 37 · Tórshavn · Tel 320410 · Fartel 520410 · www.inni.fo